HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

Uttanríkis- og Fiskimálaráðið

24. juli 2026

Hoyringssvar frá Havstovuni til lógaruppskot um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026

Havstovan mælir frá at tilluta bólki 5B 750 eyka fiskidagar fyri fiskiárið 2026 og mælir tvørturímóti til, at umsitingarætlanin verður fylgd.

Fiskidagatalið fyri 2026 er ásett við støði í galdandi umsitingarætlan og veiðireglu. Endamálið við hesi skipan er at laga fiskiskapin eftir støðuni í botnfiskastovnunum og tryggja, at veiðitrýstið verður hildið innan fyri teir karmar, sum eru ásettir í veiðiregluni.

At tilluta 750 eyka fiskidagar uttan um hesa áseting er tí eitt frávik frá umsitingarætlanini. At dagarnir formliga ikki verða roknaðir sum partur av árliga fiskidagatalinum, broytir ikki lívfrøðiligu avleiðingarnar. Eyka fiskidagarnir geva møguleika fyri øktari roynd og veiðu og fara tí at økja um veiðitrýstið.

Toskastovnurin á Landgrunninum hevur verið illa fyri í nógv ár. Sambært seinastu stovnsmeting er gýtingarstovnurin enn undir lágmarkinum, og veiðulutfallið er oman fyri hámarkið, sum er ásett í veiðiregluni. Í eini slíkari støðu eigur veiðitrýstið ikki at verða økt.

Endamálið við uppskotinum er beinleiðis, at fiskiskapurin hjá bólki 5B skal halda fram longur út á árið, og harvið økja um veiðistrýstið á toskastovnin á Landgrunninum.

Ein umsitingarætlan og veiðiregla virka bert eftir ætlan, um tær verða fylgdar, eisini tá ásetta fiskidagatalið er um at verða uppi. At leggja fiskidagar aftrat, tá teir mangla, er ein týðilig ábending um, at umsitingarætlanin og veiðireglan ikki hava ta avmarkingina á veiðitrýstið á botnfiskastovnarnar í praksis, sum tað á pappírinum verður lagt upp til. At talan er um eina serliga og tíðaravmarkaða loysn broytir ikki hetta.

Leggjast kann aftrat, at brúktu fiskidagarnir hjá Bólki 5B hava lyndi til at økjast – og harvið mangla í – tá toskurin er rak og lættliga tekur línu. Hetta tykist vera galdandi í 2026, við tað at yvirlitstrolingarnar í mars vístu, at toskurin var rak í mun til onnur ár. Hetta kann gera, at veiðitrýstið í 2026 gerst stórt, og at leggja eyka fiskidagar inn slík ár kann økja veiðitrýstið enn meira. Tilgongdin av smáfiski plagar at vera lítil slík ár og tí er hugsandi, at eyka fiskidagar slík ár hevur sera óhepna ávirkan á toskastovnin.

Viðmerkingar til útgreiningarnar

Kap. 1.1
At fiskidagar verða uppi er stýrandi elementið í fiskidagaskipanini. Tí eiga eyka dagar ikki at verða lagdir afturat við høvuðsgrundgevingini at fiskidagarnir eru brúktir.

Kapittul 1.1 lýsir í fleiri førum, at hesir ætlaðu 750 eyka dagarnir ikki eru partur av árliga fiskidagatalinum. Men ikki er greitt, um hesir 750 dagar verða lagdir afturat

útrokningargrundarlagnum, tá fiskidagar skulu ásetast fyri 2027, ella um útrokningargrundarlagið fyri fiskidagar í 2027 eru teir upprunaligu settu fiskidagarnir fyri 2026. Hetta eigur at vera skriva heilt greitt, og Havstovan mælir til, at útrokningargrundarlagið fyri fiskidagar í 2027 verður teir upprunaliga ásettu fiskidagarnir fyri 2026.

2.3
Í kapitlinum um avleiðingar fyri vinnuna verður tilskilað, at bátar í bólki 5B í 2025 avreiddu góð 10 prosent av samlaðu avreiðingunum av toski. Leggjast kann afturat, at síðan 2019 hevur hetta prosenttal ligið millum 5 og 14% - mest slánaárið 2019, tá bólkur 5B avreiddi 14% av toskaveiðuni (í tonsum) av Landgrunninum. Av tí at bólkur 5 yvirskipað avreiðir smærri fisk enn hinir skipabólkarnir, er lutfalsliga veiðan í tali hjá bólki 5B størri enn í tonsum. Hesin munur hevur týdning, tá um stovnsrøkt ræður.

At leggja 750 fiskidagar aftrat til Bólk 5B í 2026 kann gerast sera óheppið fyri eftirmetingina av føroysku umsitingarætlanini í ICES. Tað ber illa til at taka hesar broytingarnar við í simuleringarnar hjá ICES, tí tað er ikki greitt, hví júst talið 750 er valt og um hetta talið, ella okkurt annað tal kemur at verða lagt aftrat í komandi árum til hendan ella aðrar skipabólkar.

Hetta ger tað torført at koma við neyvum simuleringum. Uttan neyvar simuleringar er minni sannlíkt, at ICES fer at góðtaka úrslitið frá simuleringunum ella at góðtaka umsitingarætlanina sum burðardygga.

2.4
Nágreiningin í kapitli 2.4 um umhvørvisligar avleiðingar samsvarar væl við metingina hjá Havstovuni. Hvussu stórar neiligu avleiðingarnar verða við atliti at stovnsrøkt, veldst fyrst og fremst um, hvussu nógv eyka veiða stendst av teimum eyka tillutaðu fiskidøgunum. Tess meira verður veitt av toski og øðrum fiskasløgum, tess størri verður ávirkanin á viðkomandi stovnar. Hetta er serliga álvarsamt fyri toskastovnin á Landgrunninum, sum framvegis er í eini viðbreknari støðu.

2.18
Samsvar er ikki heilt millum talvuna og tekstin til 2.6.